# Eivør og Pætur syngja sama lag

**Árliga jólakonsertin í Christianskirkjuni verður komandi týskvøld klokkan hálvgum átta. Millum luttakararnar í ár verða tey bæði Eivør Pálsdóttir og Pætur við Keldu. Hetta er fyrstu ferð, at tey bæði syngja saman til eina almenna framførslu**

KONSERT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Eivør Pálsdóttir og Pætur við Keldu framføra á fyrsta sinni saman alment til árligu jólakonsertina í Christianskirkjuni, sum verður týskvøldið 16.desember klokkan 19.30*

*Mynd: Jan Müller*

**Klaksvík:**
Jólakonsertin í Christianskirkjuni, sum Klaksvíkar Hornorkestur skipar fyri, plagar at vera sera væl umtókt. Kirkjan er vanliga stúgvandi full av fólki, sum njóta jólatónarnar frá orkestrinum og kórum. Onkuntíð hava einstaklingar eisini verið við. Og soleiðis verður aftur í ár.

Eivør Pálsdóttir og Pætur við Keldu fara at framføra nøkur løg á konsertini, sum verður týskvøldið tann 16. desember. Tey bæði fara at syngja hvør sær og saman. Og so fara tey eisini at framføra eitt lag saman við hornorkestrinum.

Eivør fer at syngja bæði accapello og saman við klaverfylgispæli, sum Pætur fer at taka sær av.

Fyrireikarar av jólakonsertini er Klaksvíkar Hornorkestur. Tey eru sera spent uppá hesa konsertina, tí Eivør og Pætur gera hana til nakað heilt serstakt í ár.

– Hugskotið fingu vit, tá vit fóru at hugsa um konsertirnar, sum Sissel Kyrkjebø hevði í Christianskirkjuni fyri nøkrum árum síðani, sigur Heri Ellingsgaard, virkandi formaður í orkestrinum.

## Flutt til týsdag

Vanliga hevur jólakonsertin verið sunnudag. Men í ár er hon so løgd eitt týskvøld.

– Hetta er ikki nakað, sum vit hava ætlanir um, skal verða framyvir. Konsertin í ár verður týsdag av tí einføldu orsøk, at Eivør kann ikki verða í Klaksvík tann sunnudagin frammanundan, tí hon hevur eina konsert í Íslandi og kemur tískil ikki til landið fyrr enn mánadagin, greiðir Heri Ellingsgaard frá.

Hann sigur, at tey eru sera spent upp á konsertina í ár, tí hetta er eitt sera aktuelt par, sum fer at framføra saman á fyrsta sinni.

Heri vísir á, at um ein hugsar um, hvussu væl konsertirnar við Sissel eydnaðust, so er hann ikki í iva um, at tað verður sera flott, tá Eivør við síni vøkru rødd fer at syngja í Christianskirkjuni. Leggjast skal afturat, at Christianskirkjan er helst tað hølið í býnum, sum hevur bestu ljóðviðurskiftini.

Til konsertirnar við Sissel vórðu fólk so hugtikin, at tað varð klappað fyri henni í endanum av konsertini. Tað er ikki vanligt, at tað verður klappað í kirkjuni, men tá var talan um eina reina konsert. Jólakonsertin er ein andakt, har bæði inn- og útgangsbøn, signing og bønarhald er.

## Gleði og hornblástur

Sum altíð so verða horntónar og kór eisini við á konsertini. Í ár verður tað eitt nýtt kór úr KFUM og K, sum luttekur. Talan er um eitt gospelkór, sum eitur Gleði. Tað er Tummas Pauli Mýri, sum stjórnar kórinum, og fara tey at framføra nøkur jólaløg. Og so spælir fyrireikandi orkestrið sjálvandi eisini fleiri løg á konsertini.

Heri sigur, at tað eru tey somu jólaløgini, sum meiri ella minni mugu ganga aftur á hvørjum ári, tí teirra inntrykk er, at fólkið væntar tey. Men so hevur orkestrið somuleiðis eini tvey ella trý meiri ótraditionell løg við.

Norðmaðurin Kjell stjórnar Klaksvíkar Hornorkestri. Konsertin byrjar sum sagt klokkan hálvgum átta og fer væntandi at vara umleið hálvanannan tíma.

# Fløgan hjá I Am selur væl

**Tað er ein góð vika síðani, at fløgan hjá I Am kom út, og yvir 850 eintøk eru seld**

TÓNLEIKUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Nýggja I AM fløgan, xthree.one.four, ið kom á marknaðin hósdagin 4. desembur 2003, hevur longu selt yvir 850 eintøk.

Limirnir í I Am eru sera fegnir um frálíku móttøkuna, sum fløgan hevur fingið og um tey góðu søluølini.

Birgir Sigurðsson sigur, at teir høvdu ikki væntað, at fløgan fór at selja so væl beinanvegin, orsakað av at hon ikki kann sigast at vera tann mest útvarps vinarliga fløgan. Her hugsar um tann modernaða rokk-tónleikin, sum I Am hevur lagt seg meira eftir at spæla á hesi útgávuni.

Birgir leggur afturat, at um teir leggja allar promotionfløgurnar til miðlar og stuðlar afturat, so eru yvir 1.000 fløgur farnar út av goymslunum eftir einans einari viku. Og tað eru hann og hinir limirnir sera ovfarnir av.

2.000 eintøk vórðu prentað av fløguni, so kanska er spurningurin um, tað verður nóg mikið til jólasøluna, sum av álvara man fara í gongd nú.

I Am hevur ikki gjørt so nógv við at framføra her á landi, síðani fløgan kom út, og kemur tað av, at onkur teirra er í lestrarørindum í Danmark.

Men vikuskiftið 20 - 21. desembur, fara I AM at signera fløgur og spæla akkustiskan tónleik í fleiri stórum handlum kring oyggjarnar.

*Nýggja fløgan hjá I Am, xthree.one.four. má sigast at vera sera væl móttikin. Eftir einari viku eru yvir 850 eintøk farin um handilsdiskarnar í landinum*





# Fáa onki gjørt fyrrenn næsta ár

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er greiður yvir, hvussu hættislig støðan hjá alivinnuni er, men nú gerst onki, fyrrenn í fyrsta lagi í vár**

ALIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm er greiðir yvir trupulleikan, men sum politiska nú fær hann onki gjørt*

– Eg eri fullgreiður yvir trupulleikarnar hjá alivinnuni.

At støðan í alivinnuni er hættislig, kemur ikki óvart á Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum.

Í Sosialinum í gjár segði stjórin í Føroya Sparikassa, at alivinnan skal hava 180-200 milliónir í eginpeningi næsta ár, annars verður ongin fígging til at seta smolt út fyri og so doyr øll alivinnan, sum hon er, út.

Hann vísti eisini á, at árið í ár hevur prógvað, at so stórar upphæddir fáast ikki í Føroyum. Hinvegin hava útlendingar ikki loyvi til at eiga meiri enn ein triðing av einum alibrúki.

Hann mælti tí til, at útlendingar fáa fríari ræsur at seta pening í føroysku alivinnuna.

Hann helt eisini, at skipanin, sum alivinnan arbeiddi undir, varð sera óheppin, har aliloyvi verða latin politisk.

Besta dømi um tað er, at tað, at tað setti aliloyvið hjá nýstovnaða felagnum, Faroe Farming, í vanda, at løgtingsval varð útskrivað. Hetta var felagið, sum skuldi endurreisa alivinnuna í Suðuroy.

## Tikið í fullum álvara

Bjarni Djurholm sigur, at hann hevur roynt at taka politisk stig fyri at loysa trupulleikarnar hjá alivinnuni.

Men higartil hevur hann verið noyddur at ásanna, at hann hevur ikki fingið politiska undirtøku fyri royndunum at loysa trupulleikarnar hjá alivinnuni.

Eitt nú er hann greiður yvir tann stóra trupulleikan, sum alivinnan hevur at útvega eginpening næsta ar.

– Eg legði nakað síðani uppskot fyri Løgtingið um at broyta lógina, so at tað skuldi bera til hjá útlendingum at eiga 49% av alivinnuni ístaðin fyri 33%, sum nú.

– Men tað uppskotið feldi Løgtingið at kalla einmælt.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað sigur seg sjálvt, at tað ber ikki til uttan víðari at leggja eitt slíkt uppskot framaftur.

Men hann hevði kortini ætlað sær at givist at roynt einaferð afturat. Men hesuferð ætlaði hann at útvega eitt haldgott, fakligt grundarlag at byggja eina víðari viðgerð á, sum møguliga skuldi enda við einum uppskoti til Løgtingiðá um útlendskan kapital í alivinnuni.

Hann vísir í hesum sambandi á, at fyrr í ár varð ein bólkur við umboðum fyri vinnumálaráðið, alivinnuna og fíggingarstovnarnar settur at arbeiða við ymsum trupulleikum hjá alivinnuni, eitt nú spurninginum um at pantseta aliloyvi.

Nevndin varð liðug fyrst í desember - og ikki fyrst í september, sum vit av misgáum skrivaðu hósdagin.

– Undir vanligum umstøðum, hevði vinnumálaráðið nú farið at fyrireikað seg til at gera lógaruppskot. Men politiska støðan førir við sær, at nú má hetta bíða. Bjarni Djurholm sigur, at hann hevur langt síðani boðað frá, at tá ið nevndin var liðug við tað arbeiðið, var ætlanin at hon skuldi halda fram.

Og næsti arbeiðssetningurin hjá nevndini skuldi júst vera at lýsa spurningin um útendskan kapital í alivinnuni, so at hann kundi fáa eina haldgott, fakligt útgangsstøðið at arbeiða víðari eftir.

Men nú landsstýrið bara er ein starvsstjørn, ber tað ikki til hjá Bjarna Djurholm at geva nevndini nýggjar arbeiðssetningar og sostatt heldur arbeiðið uppat fyribils.

## Ikki frá degi til dags

Men at broyta skipanina, sum alivinnan arbeiðir undir, er ikki nakað, sum gerst frá degi til dags, tí tað krevur politiska viðgerð, umframt tað, at lógaruppskot skal fyrireikast og smíðast og alt tað tekur tíð.

Niðurstøðan er sostatt, at tað hendir onki í hesum sambandi, fyrrenn nýtt landsstýrið er skipað eftir løgtingsvalið 20. januar.

– Men annars mugu vit siga, at alivinnan hevur havt støðugar og tryggar karmar at arbeitt undir, so treytirnar hava verið kendar, leggur hann afturat.

# Tjóðveldisflokkurin slapp undan sakarmáli í valstríðnum

VALLýSING
*Øssur Winthereig*

Hetta valstríð verður lagt afturum, áðrenn Tjóðveldisflokkurin skal í rættin um eina lýsing frá seinasta valstríði. Víðari viðgerð av lýsingarósemjuni millum Tjóðveldisflokkin og Team 85 er útsett til eftir løgtingsvalið.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at Team 85 skaddi flokkin, tá reklamuvirkið setti eina lýsing í Sosialin valdagin í fjør. Flokkurin hevði ikki góðkent lýsingina og vil ti ikki gjalda fulla rokning til Team 85.

Tann positiva ella negativa umrøðan, sum eitt sakarmál kundi havt við sær mitt í einum valstríði, sleppur Tjóðveldisflokkurin so undan.

Sakførarin hjá Tjóðveldisflokkinum hevur biðið um, at tvey serkøn skulu meta, hvørja ávirkan lýsingin hevði á valúrslitið hjá Tjóðveldisflokkinum. Men hesum hevur advokaturin hjá Team 85 mótmælt.

Í fyrsta lagi verður mótmælt, at serkøn verður biðin um at meta um lýsingina og í øðrum lagi verður mótmælt móti persónunum, sum Tjóðveldisflokkurin hevur skotið upp, sum serkøn. Tey eru Ingvør Nolsøe, fra reklamuvirkinum Stephanssons Hús og Jóannes Hansen, kønur í politikki.

Partarnir skulu føra síni sjónarmið fram fyri Føroya Rætti síðst í januar.

# Gerhard heldur fram

Sandoyingar fáa aftur hesuferð møguleikan av velja Gerhard Lognberg á ting. Í Sandoynni hevur annars ljóðað, at fleiri flokkar at ligið fram við at fáa Gerhard Lognberg á listan.

Gerhard Lognberg hevur markerð seg á fleiri av somu økjum, sum Miðflokkurin hevur gjørt, men Gerhard Lognberg heldur altso fram í Javnaðarflokkinum. Hann hevur ikki verið bangin fyri at staðið einsamallur í tingbólki Javnaðarfloksins við sersjónarmiðjum.

Hann hevði greiða meining um Ginu-søgur uttan at hava sæð sjónleikin. Hann hevur havt greiða meining í móti fosturtøku, har Javnaðarflokkurin ikki hevur eina so greiða støðu.

Fýra nøvn eru á listanum hjá Javnarðarflokkinum í Sandoynni. Umframt Gerhard Lognberg eru Eyðstein Dalsgaard, Skálavík, Tummas Frank Joensen, Skúvoy, og Jákup Birgir Mohr, Sandi, uppstillaðir.

